## Bjørg Hentze

**Fra:** Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>
**Sendt:** 3. februar 2023 13:50
**Til:** Andreas Sjóvará; Heilsumálaráðið
**Cc:** Steinar Eirikstoft
**Emne:** SV: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Góði Andreas,

Hetta eru viðmerkingarnar hjá Landssjúkrahúsinum til uppskotið til løgtingslóg um Mínboks.

**§ 3 Almennir stovnar og løgfrøðiligir persónar kunnu sjálvbodnir, tó undantikið stk. 2, velja at samskifta umvegis Mínboks við tí rættarvirknaði sum fylgir av § 5.**
Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at endamálið við uppskotinum er at gera Mínboks til ta almennu postskipanina til Føroyar, við serliga tveimum endamálum:

- At áseta krav um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, um hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk.
- At javnstilla rættarvirknaðin av talgildum samskifti við almennu talgildu postskipanina við rættarvirknaði av skrivligum samskifti umvegis vanligan pappírspost.

Um endamálið er, at almennir stovnar skulu samskifta talgilt umvegis Mínboks, so samsvarar tað illa, at tað framvegis er sjálvboðið fyri borgarar at samskifta umvegis Mínboks. Ikki minst tá tað er krav at almennir stovnar skulu brúka Mínboks, tá talan er um viðkvæmar upplýsingar. Tað er umsitingarliga tungt fyri almennar stovnar, at stovnurin skal samskifta umvegis Mínboks við borgarar um viðkvæmar upplýsingar, meðan svar og samskifti aftur frá borgarum kann gerast á ein og hvønn hátt. Gott hevði verið um tað var lagt upp/eggja til í lógartekstinum, at allir borgarar fingu sær Mínboks.

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Í almennu viðmerkingunum til uppskotið stendur soleiðis: "Tað verður mett, at tað fer at hava positivar fíggjarligar ágóðar við sær fyri bæði land og kommunur at hava eina felags almenna talgilda postskipan, tí hvør einstakur stovnur sleppur undan at menna sína egnu talgildu postskipan, sleppur frá útreiðslum til viðlíkahald og víðari menning umframt at knýta seg í talgilda Samleikan."

Landssjúkrahúsið metir ikki, at hetta bert hevur positivar fíggjarligar ágóðar, serliga ikki fyri einstøku stovnarnar. Sum fíggjarleisturin er í løtuni, so er tað einstaki stovnurin, ið skal gjalda eitt eingangsgjald fyri at knýta seg at Mínboks, umframt at stovnurin rindar nýtslugjald fyri hvørt talgilda "bræv", sum verður sent ella móttikið.

Í almennu viðmerkingunum gongur somuleðis fram, at "Mínboks er í dag partur av Vanganum. Raksturin av Vanganum er fíggjaður av játtanini á fíggjarlógini til Talgildu Føroyar". Tá Mínboks longu í dag er fíggjaður av játtan á fíggjarlógini, er tað undrunarvert, at aðrir almennir stovnar skulu gjalda nýtslusgjøld til Mínboks, heldur enn at játtanin til virkismið er partur av játtanini. Serliga tá almennu stovnar sambart $3, stk 2 verða álagdir at brúka Mínboks, tá viðvíkur viðkvæmar upplýsingar, og tískil ikki hava møguleika at ávirka kostnaðin av hesum.

Útreiðslurnar hjá Landssjúkrahúsið til Mínboks vóru í 2022 áleið 200 t.kr. v/mvg, harafturat koma eykaútreiðslur til Elektron til pappír/brævbjálvar, pakking og porto – tá borgarin, ið samskift verður við ikki hevur Mínboks, ella ikki hevur opnað "brævið" sent umvegis Mínboks, ið inniheldur upplýsingar, har tað er týðandi at borgarin fær boðini. Landssjúkrahúsið metir ikki, at tað er rætt, at stovnurin skal gjalda fyri hvørt einasta talgilda bræv, sum stovnurin sendur, tá raksturin hjá Vanganum longu er fíggjaður.

Leggjast skal aftart, at av aðalmálunum var at javnstilla mínboks við analogt brævasamskifti. Við analogum brævasamskifti er tað vanliga bert sendarin sum rindar fyri porto, ikki móttakarin. Hetta kann viðføra, at borgarin sendir óneyðugt samskifti til almennan stovn, ið stovnurin má rinda fyri.

Vegna Steinar Eirikstoft, forstjóra

Vinarliga

**Fróði Jacobsen**
*Samskiftisráðgevi, Stjórnarskrivstovan*
Fartel +298 234585

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49 · FO-100 Tórshavn
Tel. +298 304500 · www.ls.fo

---

**Fra:** Andreas Sjóvará <Andreas.Sjovara@hmr.fo>
**Sendt:** 19. januar 2023 14:54
**Til:** Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>; KS Klaksvíkar Sjúkrahús <ks@ks.fo>; SSH Suðuroyar Sjúkrahús <ssh@ssh.fo>; Apoteksverkið <apotek@apotek.fo>; Heilsutrygd <heilsutrygd@heilsutrygd.fo>; Bjarni á Steig <Bjarni@biobank.fo>; Fólkaheilsuráðið <fhr@folkaheilsa.fo>; Guðrið Andorsdóttir <gudrid@biobank.fo>; Pál Weihe <pal@health.fo>; blakrossheimid@blakross.fo; annika@heilbrigdi.fo; martin@frelsunarherurin.fo; djo@olivant.fo; Etiskaradid <er@er.fo>; vsn@vsn.fo
**Cc:** Turid Arge <turid.arge@hmr.fo>; Steinar Eirikstoft <steinar@ls.fo>; Alexandra á Dul <alexandra@ks.fo>; Hans Pauli Henryson <hphen@ssh.fo>; Landsapotekarin <landsapotekarin@apotek.fo>; Egil á Bø <eab@heilsutrygd.fo>; Jan Simonsen <jan.simonsen@hmr.fo>
**Emne:** VS: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Góðan dagin

Heilsumálaráðið hevur móttikið viðhefta uppskot til løgtingslóg um Mínboks til viðmerkingar.

Uppskotið verður við hesum sent tykkum til ummælis.

Víst verður serliga á § 3, stk. 2-4 og serligu viðmerkingarnar til hesa áseting.
Ásetingin hevur við sær, at almennir stovnar í útgangsstøðinum skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar sbrt. løgtingslóg um dátuvernd ella trúnaðarupplýsingar talgilt til viðskiftafólk.

Tit verða biðin um at senda møguligar viðmerkingar til hmr@hmr.fo við cc til andreas.sjovara@hmr.fo **í seinasta lagi 3. februar 2023**.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit vælkomin at venda tykkum til mín.

Vinaliga/Sincerely
Andreas Sjóvará
*Fulltrúi/Head of Section*

Heilsumálaráðið / Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734015
**andreas.sjovara@hmr.fo • www.hmr.fo**

**Fra:** Marjun Jacobsen <Marjun@fmr.fo>
**Sendt:** 16. januar 2023 16:19
**Til:** Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; industry@industry.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Akstovan <Akstovan@akstovan.fo>; alzheimer@alzheimer.fo; samstarv@samstarv.org; megd@megd.fo; politi@politi.fo; kf@kf.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Strandfaraskip Landsins <ssl@ssl.fo>; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; ft@ft.fo; sev@sev.fo; Fjarskiftiseftirlitið <fjarskiftiseftirlitid@fjarskiftiseftirlitid.fo>; Skráseting <skr@skraseting.fo>; us <us@us.fo>
**Emne:** Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Góðan dag,

Fíggjarmálaráðið hevur í dag sent uppskot til løgtingslóg um Mínboks í almenna hoyring.

Mínboks hevur meiri enn 10 ár á baki og lýkur krøv um trygt talgilt samskifti, eisini í mun til dáturverndarlógina. Gjaldstovan yvirtók Mínboks í 2018 í sambandi við arbeiðið hjá Talgildu Føroyum og er Mínboks í dag ein sameindur partur av Vanganum. Mínboks lýkur ásetingar og standardar um talgilda atkomu, sum tryggjar, at so nógv sum møguligt fáa atgongd til postkassan.

Postur sum í dag verður sendur gjøgnum talgildu skipanina hevur tó ikki somu rættarligu støðu sum postur, ið verður sendur við pappíri og brævbjálva. Endamálið við lógaruppskotinum er at javnseta "vanligan" post við talgildan post, soleiðis at t.d. kunning millum stovn og borgara hevur somu rættarligu støðu, óansæð um hendan kunningin er talgild við Mínboks ella ikki. Lógarbroytingin er ein liður í arbeiðinum at gera samskiftið millum almennar stovnar og borgarar meira tíðarhóskandi og smidligt.

Borgarar skulu trygt kunna samskifta talgilt við almennar stovnar. Tí verður ásett sum krav, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar verða sendir talgilt. Tað ber framhaldandi eisini til at senda slíkar upplýsingar við vanligum posti.

Fyri at rita inn á Mínboks, skulu borgarar hava Samleikan. Borgarar yvir 13 ár kunnu fáa Samleikan. Í dag eru 33.700 fólk eru skrásett sum brúkarar í Mínboks.

Uppskotið er til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Landsstýrinum fram til 13. februar 2023 og møguligar viðmerkingar skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 13. februar 2023.

Vinarliga / Kind regards

**Marjun Jacobsen**
*fulltrúi*
Fíggjarmálaráðið/ Ministry of Finance
☏: direct: +298 55 20 04
marjun@fmr.fo

FYRIVARNI:
Innihaldið í hesum telduposti er ætlað omanfyri nevnda móttakara, og kann innihalda upplýsingar veittar í trúnaði. Um tygum ikki eru rætti móttakarin, gera vit vart við, at tað ikki er loyvt at avdúka, margfalda, spjaða ella á annan hátt at nýta innihaldið. Um tygum, orsakað av mistaki, hava móttikið henda teldupost, hóast hann ikki er ætlaður tygum, setið tygum vinarliga í samband við meg gjøgnum telefon ella við telduposti skjótast gjørligt. Hesin teldupostur myndar ikki nakað tilboð ella játtan av nakrari sáttmálabundnari avtalu. Slík tilboð ella játtanir mugu fráboðast í brævi ella øðrum skrivi.

CONFIDENTIALITY NOTICE:
The information contained in this email is intended for the named recipient only as the contents may be confidential. If you are not the intended recipient, we must inform you that you are not permitted to reveal, copy, distribute or otherwise use the contents. If you have received this email by mistake although it is not meant for you, please contact me by telephone or by email as soon as possible. This email does not represent any offer or acceptance of any contractual agreement. Notification of any such offer or acceptance must be given by letter or in other written format.